Postverk Føroya, Frímerkjadeildin:

# Top of the World of Stamps – nýtt norðurlendskt samstarv




*Top of the World of Stamps er eitt nýtt norðurlendskt frímerkjasamstarv*

**Í 2004 verður samstarvið millum tey átta norðurlendsku postverkini styrkt gjøgnum frímerkjaátakið Top of the World of Stamps. Tríggjar tær fyrstu útgávurnar hava evnið: Norrøn Gudalæra. Tann 26. mars verður fyrsta útgávan, sum er um guddómar**

Allar útgávurnar verða savnaðar í eini mappu, so tað verður lætt at ogna sær frímerki úr øllum Norðurlondum, tvs. Danmark, Finnlandi, Føroyum, Grønlandi, Íslandi, Noregi, Svøríki og Álandi.

Í mappuni eru allar átta tulkingar - átta frímerkjaørk við 1 ella 2 frímerkjum í hvørjum. Støddin er tann sama á øllum smáørkunum. Sagnirnar verða fortaldar við myndum á frímerkjaørkunum og við tilhoyrandi teksti á upprunamálinum umframt á enskum og týskum. Mappan er til keyps hjá norðurlendsku postverkunum.

Norðurlandamappan Top of the World of Stamps -04 verður alment givin út á frímerkjastevnuni NorrPhil 04 í Täby uttan fyri Stockholm tann 26.-29. mars 2004. Í januar verður ein síða løgd út á internetið har bæði mappan og tær einstøku útgávurnar verða sýndar fram. Síðan eitur www.topoftheworld.nu.

### Norðurlendskt samstarv síðan 1956

Norðurlendska samstarvið á postøkinum byrjaði í 1946, tá Danmark, Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki settu Norðurlendska Postfelagið á stovn. Endamálið var betri at kunna samskipa postgongdina landanna millum. Eitt úrslit av samstarvinum er m.a. felags frímerki og eru hesi sonevndu Norðurlandafrímerkini vorðin sera áhugaverd hjá savnarum.

Fyrsta norðurlendska felagsútgávan kom út í 1956. Londini ið við vóru, vóru Svøríki, Noreg, Danmark, Finnland og Ísland. Myndevnið hjá londunum var tað sama, fimm flúgvandi svanir, sum ímyndaðu tey fimm londini. Seinnu útgávurnar høvdu eisini sama myndevnið, Víkingaskip 1969, Norðurlandahúsið í Reykjavík 1973 og Nykurtir 1977.

Í 1980 fóru tey fimm londini at geva út egin myndevni til sama evni. Eldri Brúkslist var evnið í 1980, Ferðavinna í 1983, Vinabýir í 1986 og Fólkabúnar í 1989. Nú vóru eisini Føroyar komnar upp í samstarvið, og tvey ár seinni komu Áland og Grønland eisini við. Norðurlandaútgávurnar hildu áfram í 1991, 1993, og 1995 við evninum Ferðamannamál, 1998 við Sigling og 2002 við Almennari List. Í alt 14 Norðurlandaútgávur hava verið síðan 1956. Nú byrjar samstarvið sostatt av nýggjum við mappuni Top of the World of Stamps og frímerkjarøðini Norrøn Gudalæra.

At stíga fram saman og hava eitt net yvir um landamørk er eyðvitað fyri norðurlendingar. Søgan, felags mentunararvurin og málnýtslan hava birt upp undir hetta. Í dag er fleiri ymiskar rásir við norðurlendskum samstarvi, harímillum Norðurlandaráðið og Norðurlendska Ráðharraráðið.

Í nýggja frímerkjasamstarvinum Top of the World of Stamps geva postverkini í teimum átta norðurlondunum út eina frímerkjarøð í trimum pørtum við evninum Norrøn Gudalæra. Fyrstu frímerkini verða givin út í 2004 og eru um gudaheimin. Við í útgávuni eru postverkini í Danmark, Finnlandi, Føroyum, Grønlandi, Íslandi, Noregi, Svøríki og Álandi. Við hvør sínum smáarki, sum verða savnað í eini felags mappu, geva tey teirra mynd av sagnunum. Komandi útgávurnar verða í 2006 og 2008. Útgávurnar og samstarvið verða nærri lýst á www.topoftheworld.nu.

*Kelda: Frímerkjadeildin*

Postverk Føroya, Frímerkjadeildin:

# Tvær nýggjar frímerkjaútgávur




*Frímerkini "Ferðin við jaktini "Mariu", summarið 1854*




*Frímerkini "Tórur og Rán" úr Norrønu gudalæruni*

**Fríggjadagin 26. mars gav Frímerkjadeildin hjá Postverki Føroya út tvær nýggjar frímerkjaútgávur. Onnur er um "Tórur og Rán" úr Norrønu gudalæruni og hin er um eina ferð við jaktini Mariu í 1854**

FRÍMERKJAÚTGÁVA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Norðurlond hava somu søgu og sagnir. Fyrsti partur av frímerkjarøðini varð givin út tann 26. mars 2004. Útgávan fevnir um átta frímerkjaørk, sum hvør á sín hátt tulka norrønu sagnirnar. Føroysku frímerkini eru um Tórur og Rán.

Rán veiddi á havinum við nót, ið hon dróg teir sjólætnu inn við. Tær villu bylgjurnar vóru døtur hennara. Tórur var umtóktur av føroyingum, ið róptu ting- og høvuðsstað sín fyri Tórshavn. Tvey ymisk frímerkir vóru í hesi útgávuni.

### "Ferðin við jaktini Mariu í 1854"

Hin útgávan er úr eini ferðafrásøgn hjá bretunum Samuel Rathbone og E. H. Greig, um rundferðina millum oyggjarnar við jaktini "Mariu", summarið 1854.

Ferðafrásøgnin er ein skemtilig og stundum speisk lýsing av samanstoytinum millum tveir viktorianskar gentlemen og eina burturoldaða mentan. Men frásøgnin gevur eisini eina rættiliga beinrakna lýsing av trupulleikunum hjá einari tjóð, sum um hetta mundið var við at leggja miðaldar hugsjónirnar frá sær og byrja sína ómetaligu menningarferð fram til okkara nútímans samfelag.



*Føroysku frímerkini hava stóran áhuga hjá fremmandu ferðafólkunum. Her er Sámal Bláhamar, frá Toru Tourist Traffic, við einum norskum bólki, sum kom við Norrønu mánadagin 29. mars*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Ferðafrásøgnin er myndskrýdd við vøkrum steinprentum, sum verða endurgivin á frímerkjaarkinum. Átta ymisk frímerki eru í hesi útgávuni.

Bókin verður endurgivin í sínari heild á nýggja tematiska databasanum hjá Frímerkjadeildini: www.faroephilately.fo





*Við leikinum »Vinkonur« prógvar Klaksvíkar Sjónleikarfelag, at vit ikki skulu vera bangin fyri at krevja nakað av áhugaleiki, og at tey heldur ikki eru bangin fyri at krevja nakað av sær sjálvum*

*Mynd: Kls.*

# Eitrað vinabond

**Slatur, samansvørjingar og ísakaldur, svartur humor. Við heilum og hálvum lygnum spinna vinkonurnar sítt sjúka lokkanet runt um seg sjálvar og áskoðarnar. Men lokkanet eru viðbrekin. Togar tú í ein tráð, so …**
**Nýggi leikurin "Vinkonur" hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag var frumsýndur seinasta leygarkvøld**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Minnist tú heksina frá tínum flokki, sum altíð avgjørdi, hvør slapp uppí ella ikki, og sum allar vildu vera vinkonur við? Ella hina, sum altíð hekk uppi í reyvini á øllum, bara fyri at hava onkra at fylgjast við? Og so hana sjálva á fremsta bonki, sum dugdi alt og skrivaði so forbiðið pent.

Oys, tær vóru troyttandi. Gott, man hevur gloymt alt um tær.

Men tær hava ikki gloymt teg, og nú spøkja "Vinkonurnar" aftur í Atlantis.

### Skúlagarðurin

Tú verður ávarað, longu áðrenn tú fert inn í sjónleikarahølið: Alt, sum tú nú fert at síggja og hoyra, skal takast við fyrivarni. Líka stórum fyrivarni sum tað, 12-13 ára gamlar gentur kunnu finna uppá at skriva í eina poesibók, og tað sigur ikki so lítið. Síðurnar hjá Em, Bee og Chris eru skræddar úr poesibókini og settar saman sum leikskráin til sjónleikin "Vinkonur." Eitt sera hittingarsamt hugskot, sum bumbar teg lúkst aftur í skúlagarðin, har vinkonur vórðu skiftar út líka skjótt og eirindaleyst, sum penalhúsið ella plakatirnar av poppstjørnum á vegginum.

18 ár seinni. Vinkonurnar eru nú í 30’unum, men hóast útbúgving, familja og karriera eru komin afturat, standa tær framvegis fangaðar í sálarliga skúlagarðinum.

### Klokkan

Klokkan er átta hetta leygarkvøldið í Atlantis. Tað er hon eisini í summarhúsinum í Fraklandi, har Em, Bee og Chris hittast aftur. Og eins og vit áskoðarar seinni hetta kvøldið fara at ivast eina løtu, um tað nú er aftur ella fram klokkan skal flytast til summartíð, byrjar leikurin eisini við hesi afturvendandi trætuni.

Frá byrjan verður tíðin eitt lutfallsligt hugtak á sama hátt, sum minnini frá fortíðini. Sjálvt um tær ætla tað øðrvísi, er tað, sum hendir hetta kvøldið í summarhúsinum í veruleikanum eitt framhald av klandrinum á veg í og úr skúla. Klandrið er nú vorðið eitt sofistikerað maktstríð, har vinkonurnar krampakent royna hvør í sínum lagi at fáa eithvørt slag av uppreisn við at venda gomlu leiklutunum á høvdi. Men tað er ikki so einfalt, tí upplivingar, sum hava fylgt einari alt lívið, hevur ein onnur púra gloymt. Tað, ein minnist við ræðslu, minnist ein onnur sum tað bera tvætl. Og meðan teirra ymisku útgávur av hendingunum so við og við splintra illusjónina um eina felags fortíð, gerast tær tríggjar alsamt meir fremmandar hvør fyri aðrari. Vóru tær í grundini nakrantíð vinkonur? Er tað yvirhøvur nøkur meining í at hittast aftur? Var hetta ikki mest av øllum eitt vinalag, tær allar helst vildu verið fyri uttan?

### Lova mær út!

"Spyr hana, hví eg havi klaustrofobi", rópar Bee aftur og aftur, og røddin piprar av ræðslu. Minni um spælið hjá Chris, har Bee skuldi jarðast í einum 3 metur djúpum holi, tí hon luktaði so illa, hevur fylgt Bee alt lívið, og nú vil hon sleppa upp, út, langt burtur frá hesum sjúka vinalagnum. Men Chris er eisini á veg burtur. Hon hevur sett eitt lag á fløguspælaran og syngur droymandi um at sleppa "at dansa hetta lokkanetið av okkum." Eftir gongur Em og roynir framvegis at rudda upp í fortíðini, inntil eisini hon gevur upp og finnur sín egna skelkandi máta at enda hesa ræðusøguna.

Men klokkan skal jú flytast hetta kvøldið. So um nú Em flytur klokkuna ein tíma fram og ein aftur, er seinasta hendingin jú ongantíð hend, ella hvussu …

### Halt ondini

Leikurin byggir ikki á eina vanliga søgugongd, har ein hending førir eina aðra við sær. Tað eru leikarnir og samanspælið teirra millum, ið ber leikin uppi og fær søguna at flyta seg. Og tað megna tær tríggjar Jacobina Heinesen, Jakobina Joensen og Eyð Matras sum ávikavist Em, Bee og Chris framúr væl. Eitt orð, eitt eygnabrá, eitt skift í tónalagum og huglagið á pallinum broytist, sum vórðu leikarnir raktir av einum snarljósi. Tað er ógjørligt hjá áskoðarnum at gita seg til, hvat fer at henda, og tí situr tú sum á nálum og heldur ondini og varnast ikki, at ongin pausa var, fyrr enn leikurin er liðugur.

Slíkt krevur sín leikara. Eg dugi illa at ímynda mær nakran, ið kann spæla so sannførandi fjálturstungin og bláoygd, sum Jacobina Heinesen. Eyð Matras hevur tað, ið skal til fyri at fylla pallin bert við sínum andlits- og eygnabrøgdum, meðan Jakobina Joensen hevur ein serligan eginleika til at tykjast fullkomiliga órørlig og kensluleys. Tess ógvusligari verður tað, tá hon umsíðir brestur við sínum eirindaleysu avdúkingum, har ongin verður spardur fyri teir andstyggiligu smálutirnir. Eftir mínum tykki, eru tað eisini hesi brotini við ákærunum frá Bee, sum raka dyggast og standa sterkast í leikinum.

### Nýskapandi

"Tað er ikki fyri mark at krevja nakað av áhugaleiki". Nakað soleiðis segði ein av okkara meir bersøgnu ummælarum herfyri í sínum ummæli av einum áhugaleiki. Veit ikki, um eg skilti hann rætt, men viðmerkingin fekk meg at hugsa um skúlakomediur, har eitt væleydnað avrik merkti á leið tað sama sum, at ongin datt av pallinum ella gjørdi mammu og mostir fyri skommum.

Undir øllum umstøðum er samanberingin heilt burturvið. Ongin áhugaleikari fer at brúka mánaðir uppá venjing undir truplum umstøðum, um hann onki hevur uppá hjarta, og onki heldur seg hava at bjóða. Tað vita vit, og tí taka vit tey í álvara og vænta nakað av teimum.

Við leikinum "Vinkonur" prógvar Klaksvíkar Sjónleikarfelag enn einaferð, at vit ikki skulu vera bangin fyri at krevja nakað av áhugaleiki, og at tey heldur ikki eru bangin fyri at krevja nakað av sær sjálvum. Nýggi sjónleikurin hjá felagnum er nýskapandi og øðrvísið, bæði í innihaldi og uppseting, og boðar frá einum áhugafelag, ið ikki ræðist avbjóðingar ella at ganga nýggjar leiðir á pallinum.

**Fakta um »Vinkonur«**

| | |
|---|---|
| Em: | Jacobina Heinesen |
| Chris: | Eyð Matras |
| Bee: | Jakobina Joensen |
| Týðarar: | Andreas Justesen og Birita Mohr. |
| Pallmynd og búnar: | Edward Fuglø |
| Leikrit: | Tamsin Oglesby |
| Leikstjóri: | Birita Mohr |